# Greinasavn



**Partur av arbeiðinum á einum tíðindablaðið er sjálvandi eisini at hava skil á savninum av greinum. Her er tað eitt av blaðfólkum okkara, sum hevur rokast í havanum, og burtur úr tí er eisini komið eitt slag av greinasavni**

Málstrikan MÁLFELAGIÐ

## Neyðars Hanus

Dimmalætting kunngjørdi á forsíðuni, at HANUS FRYSTIR Lesarin undrast. Er hesin vældámdi sangarin nú farin at frysta sild ella høgguslokk fyri at yvirliva? Tað mátti verið skomm fyri okkara myndugleikar, tí so nógv avlopstalent hava vit ikki í hesum landinum.

Meiningin var sjálvsagt, at tað var kalt inni hjá Hanusi. Hann var kaldur. Men summi miðlafólk duga bara at hugsa á donskum og kenna ikki mun á aktiv og passiv. 'Frysta' er transitivt og kann gera ein aktivan setning: „Teir frysta allan fiskin". Í tí passiva setninginum eitur tað 'frystast' ella 'verða frystur'. Í kriminalromanum kann tað eita: „Blóðið frystist til ís í hansara æðrum". Ikki frysti. „Hanus frystir" kann bara vera transitivt (ávirkandi), t.e. hann frystir okkurt. Her er sama neyðin sum við tí skrekkiligu málspilluni *venja* í intransitivum brúki. Sagnorðið venja er transitivt, tekur ávirki. „Vit venja hvønn mikudag", siga tey sakleysu ungu, sum hava havt ringar lærarar. Tað eitur *trena*, tí *venja* kann ikki brúkast intransitivt.

Hvat er hent við grammatikkundirvísingini í okkara skúlum? Er hon niðurfryst? (MT)

# *Í rangastrúpan*

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

### Óheft og álítandi?
"Kenny Rogers ikki avlýstur"
Dimmalætting

### ...rakar hvørja ferð
"Kenny Rogers til Føroya"
(Dimmalætting, 14/1-2009)
"Kenny Rogers til Føroya í september"
(Dimmalætting, 25/2-2009)
"Prodigy á G!"
(Dimmalætting, 4/6-2007)
Svensk Grand Prix drotning á G!
(Dimmalætting 4/7-2006)

### Her var nok onkur gás íblandað
"...CHE samgonguna, sum alment slitnaði av gásagøluni í Tinganesi"
Sosialurin

### Fáa fleiri atgongumerki
"Umboðini fyri Sp/f Holmen siga eisini, at fólk, ið hava keypt atgongumerki, kunnu fáa hesi aftur við at venda sær Sp/f Holmen."
Ras2

### Tvørstongin mundi skorað!
"Tá ið 44 minuttir vóru leiktir hevði Sam Malson eitt dundurskot á tvørstongina, sum lættliga kundi havt givið mál"
Dimmalætting

### Rakti við síðuna av
"Føroysku skjúttarnir hava í morgun vunnið bronsu"
Rás2

### Hann vil ikki út!
"Javnaðarflokkurin veit ikki, hvør skal út í Landsstýrið efitr Hans Paula Størm"
Útvarp Føroya

### Úr djóralívinum
"Koppingarevni móti svínakrími verður klárt til heystar"

Sosialurin